## DAGSINS MEINING

# Síggið Føroya land

Fyrsta fremmanda ferðamannaskipið kom á Havnina í farnu viku. Tað plagar at vera tekin um, at summarið er komið. Tó at tað hevur verið kalligt og norðanætt, so hava hesir seinastu dagarnar kortini verið sólríkir og hava boðað frá sumrinum.

Hóast veðrið kortini kenst svikaligt og lítið summarsligt alla staðni, so verður tó riggað til enn eitt ferðafólkasummar. Bæði loftvegis og sjóvegis koma mong ferðafólk til landið. Atlantsflog og Smyril Line gera sítt ítarsta til at flyta fólk millum lond. Hotel og gistingarhús kring landið lata upp dyrnar fyri teimum fremmandu, sum so aftur eru ein partur av gerandismyndini komandi mánaðirnar. Ein hugaligur partur, tí tað er altíð gott og sunt at fáa vitjan av fremmandafølki. At kunna gleða tey men eisini at kunna fáa íblástur frá teimum.

At hesi so eisini eru við til at fylla karmarnar út í okkara búskapi, sum ein partur av ferðavinnuni, er positivt og gott. Her royna so myndugleikar og privat at gera sítt til, at fremmandu gestirnir skullu kenna seg væl og verða væl móttiknir.

Ferðaráð Føroya ger eitt stórt arbejði saman við kommunalum myndugleikum og privatu vinnuni. Ikki bert fyri útlendingar men eisini fyri føroyingar sjálvar, sum vilja ferðast í egnum landi. Hjálpa okkum at lata eyguni upp fyri, hvussu einastandandi vakurt og friðsælt okkara egna land er. So løgið tað ljóðar, so eru tað mangir føroyingar, sum als ikki hava upplivað sítt egna land. Ja, fær út og spyr, hvussu mong hava verið í Mykinesi, Fugloy ella fyri tað í Suðuroy! Og tú vil gerast sera sera bilsin av svarinum. Tað er nevniliga so, at sera mong av okkum kenna ikki okkara egna land og harvið heldur ikki týðandi partar av okkara søgu og mentan.

Og tað er so eisini hetta, sum ferðavinnan og myndugleikar vilja bøta um við eitt nú lýsingum í bløðunum og faldarum av ymsum slag. Vit síggja í hesum døgum m.a., at tað verður lýst við at ferðast í Sandoy og Skúvoy. Og har uppliva part av gomlu søgu okkara, í Sandoynni at hoyra um og síggja víkingabústaðir og í Skúvoy um ein part av okkara elstu søgu okkara.

Tað er hugaligt at siggja fremmandu ferðafólkini í gøtunum og í náttúruni. Og tað er enn meira hugaligt at síggja føroyingar sjálvar geva sær fær um sítt egna vakra land. Og tað er greitt, at ein fortreyt fyri at hetta letur seg gera er gott samband millum oyggjar og búpláss. Vit hava so eisini upplivað eina sera hepna gongd í so máta, har vegir, berghol og nú eisini undirsjóvartunlar knýta landið saman á ein hátt, at tað er lagamanni hjá bæði fremmandum ferðafølki og okkum sjálvum at ferðast millum oyggjarnar. Nú um dagarnar kom heim ein skjótsiglandi og vakur ferðamannabátur til Vestmanna, sum skal vera enn eitt klípi í einum betri flutningi og vera við at at byggja brýr millum ymsu oftani ótilgongiligu partarnar av landinum. Vælkomin nýggja Silja.

Lat okkum vóna, at vit fáa eitt gott summar. Og lat okkum geva øllum teimum, sum hava gjørt og gera sítt til at fáa útlendingar eins og føroyingar at vitja vøkru og stoltu oyggjar okkara eitt herðaklapp. Og kann hetta vera við til at menna ein part av búskapinum, so kann tað ikki verða betri heldur. Gott summar øll somul. Og eisini tykkum, sum leggja leiðina í Vágsbotn.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Prestastarvið í Dómkirkjuni

**Thomas J. Askham**



Tað er ein lítið heiðurlig viðgerð og viðferð sum tann ungi presturin Fonsdal hevur fingið frá teimum, sum sita á ovastu rók í fólkakirkjuni.

Sum skilst so koyra próst Bæk og biskop Joensen parleyp fyri at diskvalifisera henda unga og vælumtókta prest frá starvinum.

Hevði tað nú verið so at Fonsdal lanseraði nøkur heilt spildirnýggj sjónarmið, um kvinnuligar prestar og um uppafturgiftu spurningin, so kundi ein skilt at farið var móti manninum sum gjørt verður.

Persónliga kendi og minnist eg prestar, sum høvdu sama sjónarmið sum Fonsdal, hesir prestar fingu frið at virka sum prestar í kirkjuni, eisini í tí gomlu havnar kirkju – nú dómkirkjuni.

Í hesum skammiliga og lítið tignarliga máli týður alt uppá, at biskop Joensen hevur ein alvorligan leiðaratrupulleika, hann letur seg draga í maneguni av nøkrum makt søknum persónum.

Fyri at vísa eitt slag av myndugleika (autoriteti) so leggur hann á har garðurin er lægstur og fær danir at hjálpa sær at taka livibreyði frá familjuni Fonsdal.

Vit kunnu bert ásanna, og staðfesta at tey mongu árini vit høvdu Jákup Joensen og Eivind Vilhelm sála sum bispar, valdaði ikki so nógv misnøgd í kirkjuni.

Teir høvdu tey evnini at kunna tosa seg til sættis um eitt hvørt tók seg upp.

Tað varð ein líka so blandaður skari av prestum, sum vit hava tað í dag, ein skari sum er so rúkandi ósamdur um bíbilskar spurningar og hvussu teir skulu skiljast og útleggjast, tó atlíkavæl eydnaðist tað at halda hesum spenningum innanveggja. Jú, Joensen og Vilhelm kundu og dugdu hetta at umgangast fólk.

Tann blandaði skarin av prestum vit hava í dag er ikki minni ósamdir í bíbilskum spurningum, um ein ikki sjálvur lesur í orðinum, men bert letur seg leiða av tí ein fær boða, so verður ein skjótt bæði ørkymlaður og forvirraður.

Tí er spurningurin, hví skal Fonsdal ofrast?

Er tað tí hann hevur eina sjálvstøðuga meining um kvinnuligar prestar og um uppgiftusprurningin?

Ella er tað tí hann tekur Guds orð sum tað er?

Tað mugu vera tey fægstu, sum keypa hasa, at ongir pengar eru til starvið, eitt navn má barnið hava. Um so er at peningur trýtur, so má kirkjan sum stovnur royna at finna hvar kunna vit spara og hvar kunna fáa hesar pengar, tað eru allir aðrar stovnar her í landinum noyddir at finna út av.

Hvat við at hyggja uppá konti um viðlíkahald av havaarbeiði við prestagarðar, har hevði óivað verið nakrar krónur at heinta.

### Kirkjuráðið í Dómkirkjuni

Vit hoyra ikki eitt pip frá kirkjuráðnum í fjølmiðlunum, eru tit sett heilt út á eitt síðuspor?

Kunnu tit góðtaka at tann presturin tit sjálvi vildu hava og sum tit valdu til kirkjuna er bara fjernaður vegna maktgirnd.

Hava tit sum kirkjuráð gjørt eina kanning millum konfirmantar og foreldur teirra, hvat siga tey, at annar prestur tekur yvir.

Møguliga er tað ikki tykkara uppgáva, tað vildi givið tykkum eina mynd av hvat brúkarin av kirkjuni hevði at siga.

Tað eru foreldur sum hava verið sera, sera fegin um tað tíðina sum børn teirra hava gingið til hjá Fonsdal, hann hevur megnað at fáa børnini at interessera seg meira fyri tí andaliga, tað vóru tey foreldur, sum ynsktu at tað var Fonsdal, sum fermdi (konfirmeraði) børn teirra, nú er so tann gleðin tikin frá teimum vegna maktsøkni.

Nú má tíðin vera komin hvar kirkjuráðið, um tað hevur nakran myndugleika ruddar upp í dómkirkjuni og fær tingini uppá pláss.

Nú er tað óivað onkur, sum hevur reist seg úr sæti, og spyr hvat billar hann sær inn at blanda seg uppí hettar, hann gongur ikki í dómkirkjuna.

að er púra rætt eg gangi ikki í dómkirkjuna, eg vil gera brúk av mínum demokratiska rætti og sum limur í tí føroysku fólkakirkjuni og sum gjaldari av kirkjuskatti, vil eg luttaka í debattum sum hava mín áhuga innan fólkakirkjuna.

Mín áheitan til kirkjuráðið í dómkirkjuni, berið so í bandi, at uppsøgnin av Fonsdal verður innaftur drigin, so maðurin kann halda áfram um hann ynskir tað.

### Ein seinasti spurningur

Eg vil venda mær til tín Fonsdal við einum spurningi?

Var tú vitandi um tey viðurskiftir, sum vórðu í dómkirkjuni, um kvinnuprestin og støðuna hjá próst Bæk?

Kanst tú greina hettar fyri okkum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.